LM-104/2023

TÓRSHAVN 25. MARS 2024

FØROYSKIR FISKIMENN UTTANLANDS, FFU



NEVNDIN Í FØROYSKIR FISKIMENN UTTANLANDS

FRÁGREIÐING

AVTØKA AV § 154 B FRÁDRÁTTINUM

(Avtøka av frádrátti í skattinum fyri sosial gjøld uttanlands fyri tey, ið arbeiða uttanlands)

Búskaparligar, formligar og aðrar avleiðingar - og møgulig loysn

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

INNIHALD

SAMANUMTØKA OG TILMÆLI 3
INNGANGUR 6
Bakgrund 6
Endamál og innihald 6
Avleiðingin av at avtaka § 154 B frádráttin 9
Norsk Folketrygd og Maritim Pensionskasse - meginregla at tekna trygging 10
Skattskyldugir føroyskir útisiglarar í Norra 12
Munurin á norskum og føroyskum fólkatryggingum o.a. 13
Ósemja um slag av pensjónskipanum 14
Norðurlendska tvískattaavtalan 15
Norðurlendska sosialkonventónin 16
Serskipanir uttanlands til sjófólk 16
Avmarkingar 17
VIRKSEMI HJÁ FØROYINGUM Í STARVI UTTANLANDS 18
Hví serskipanir í Føroyum og øðrum londum? 18
Valutainntøkur til Føroyar 18
Føroyingar við norskum fiskiskipum og inntøka 19
Vandin fyri fráflyting og flyting í aðrar skipanir, NIS og DIS 19
BÚSKAPARLIGAR ÚTROKNINGAR - HAGTØL OG GREININGAR 21
Gamla og nýggja skipanin - broytingin 21
Skattaútrokningar - fíggjarligar avleiðingar 21
Ávirkan frá lønarinntøkum á almennu kassarnar 24
Vanligt við serskipanum - fiskimenn uttanlands minni virdir í Føroyum 25
FISKISKAPUR Í BARENTSHAVINUM - ÚTLIT 27
Toskafiskiskapurin í Barentshavinum í kreppu - føroyingar raktir 27
Veiðihagtøl - nøgdir og virði 28
HVAT TALAR FYRI EINUM FRÁDRÁTTI - KOMPENSATIÓN 30
ARBEIÐS- OG TÍÐARÆTLAN 31

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

SAMANUMTØKA OG TILMÆLI

Føroyskir fiskimenn uttanlands (FFU) hava við broytingunum í skattalógini í desember 2023 mist § 154 B frádráttin, við gildi frá 1. januar 2024, og verða hereftir nógv harðari skattaðir. Talan er um hækkingar millum 24-38% í sjálvum skattinum, treytað av inntøkuni, og 10-11% hægri skattatrýst í 2024. Henda ógvusliga skattahækking kemst av, at føroyskir fiskimenn framyvir ikki fáa linking á skattinum, svarandi til inngjaldið til Norsk Folketrygd (NF) og Maritim Pensionskasse (PMK) - eisini kallað sosial gjøld.

Viðmerkjast kann, at allar hinar serskipanirnar í skattauppskotinum frá landsstýrinum 3. november 2023, vórðu tillagaðar, uttan bara § 154 B frádrátturin, sum varð strikaður heilt av Løgtinginum.

Útgjøldini frá NF og MPK verða eisini skattað sum vanlig skattskyldug inntøka, hóast tey eru inngoldin av upphædd eftir skatt ella uttan nakra linking í skattinum ella frádrátt í inntøkuni. Hetta stríðir í móti meginregluni í skatting, at ein persónur ongantíð skal gjalda tvær ferðir skatt av somu inntøku ella gjalda skatt av somu inntøku í tveimum støðum.

Útgjøldini frá NF og MPK verða við hesari skipanini tvískattað, tá tey einaferð eru útgoldin til at ráða yvir.

Talan er um einar 170 føroyskar fiskimenn uttanlands, sum nú eru raktir av broytingunum í skattalógini um at strika § 154 B frádráttin.

Tað eru eisini gjørdar aðrar broytingar í nøkrum av serskipanunum, men tær hevur FFU valt ikki at viðgera í hesari frágreiðingini - eitt nú er samdøgurfrádrátturin lækkaður úr 300 kr. niður í 120 kr. í 2026.

Endamálið við skattapakkanum frá samgonguni var, saman við øðrum átøkum, at fíggja ein skattalætta til føroyingar við inntøku millum 120.000-820.000 kr. Tvs. argumentið, at fiskimenn uttanlands hava ráð til at gjalda meira í skatti, heldur als ikki, tá hugt verður eftir, hvørjir inntøkubólkar á landi fáa skattalætta í 2024 og 2025.

Føroyskir fiskimenn í Norra gjalda 7,8% til NF og 1,7% til MPK. Men at tí, at føroyskir myndugleikar hava góðkent hesa norsku pensjónsskipanina, eru teir frítiknir at rinda til tvungu privatu eftirlønarsamansparingina í Føroyum. Víst verður her til Nordisk Konvention om Social Sikring/EØS- forordning 883/04, har útgangsstøðið er, at ein rindar avgjøld til sosialu skipaninar í tí landinum, har ein arbeiðir.

Tað er bæði rætt og rímuligt at líkastilla føroyskar fiskimenn uttanlands - sum bæði búgva og gjalda skatt í Føroyum - við aðrar borgarar. Hetta merkir, at hesir fiskimenn eiga at fáa ein frádrátt í skattinum ella inntøkuni, eins og aðrir útisiglarar fáa, tá teir gjalda inn til eina privata norska eftirlønarsamansparing, sum eisini er góðkend av føroyskum myndugleikum.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

NF og MPK ella norska pensjónsskipanin er, sum áður nevnt, góðkend av føroyskum myndugleikum o.a. - tí eru føroyskir fiskimenn eisini frítiknir at velja eina privata tvungnað skipan við eftirlønarsamansparing í Føroyum, og NF og MPK eru harafturat privatar pensjónsskipanir - ikki kollektiv fólkapensjón. So nógv talar fyri at líkastilla teir fiskimenn, sum gjalda skatt í Føroyum, men eru partur av privatari pensjónsskipan í tí landinum teir forvinna inntøkuna.

Tað gevur onga meining at tvinga fiskimenn uttanlands eisini at velja lógarásettu samansparingarskipanina í Føroyum (12% í 2026). Hetta kemst serliga av, at norska pensjónsskipanin er nógv betri enn tann føroyska og gevur bæði hægri útgjald og hægri veitingar undir t.d. sjúkralegu.

Ongar forðingar er fyri, at politiski myndugleikin líkastillar føroyskar fiskimenn uttanlands við føroyskar skattaborgarar við einum skatta- ella inntøkufrádrátti.

Tað er ein sannroynd, at strikingin av linking í skattinum, hevur við sær, at fleiri fiskimenn uttanlands upp á stutt og millumlangt sikt fara at velja at flyta bústað til annað land ella flyta í aðra vinnu undir NIS ella DIS – og hetta er longu við at henda. Upp á sikt hevur hetta so aftur við sær, at almennu kassarnir netto missa millióna upphæddir í skattainntøkum við hesum inntrivinum. Eisini dettur inntøkan eftir skatt úr peningarenslinum, lægri mvg-inntøkur o.a., um flutt verður til annað land. Bara um t.d. 35 fiskimenn ella umleið 20% flyta til annað land, er nóg mikið til, at almennu kassarnir netto fara at missa stórar upphæddir í skattainntøkum o.a.

Føroyingar, sum pendla, leggja eftir seg umleið eina 1.000.000.000 kr. í lønarinntøkum í Føroyum - ein millard svarar til heili 8,5% av samlaðu árligu lønarútgjaldingunum. Talan er um fólk, sum eru burtur frá familju o.a., men verða nærmast revsa við at strika tær serskipanir, sum hava bøtt um hesa støðuna. Onnur lond virða hesi fólk meira og geva, bæði hækkandi frádráttir og frítøku fyri skatt.

Útisiglarar við norskt skrásettum skipum, sum virka á norska sokklinum, og sum sigla við skipum í alivinnuni, frálandavinnuni, fólk, sum arbeiða á landi og onnur, sum hava skattskyldu í Norra, gjalda til NF og MPK. Men hesir gjalda bara skatt, tá pensjón og aðrar veitingar varða útgoldnar.

Føroyskir fiskimenn í Norra skulu harafturímóti - sum teir einastu, sum eru fult skattskyldugir í Føroyum - gjalda til NF og MPK av skattaðum pengum og so aftur gjalda skatt við útgjaldi av pensjónini. Hetta er vísir greitt, at skipanirnar ikki hanga saman og eru sera órættvísar, har ein føroyskur fiskimaður nú skal gjalda munandi meira inn til NF og MPK fyri at fáa somu pensjón, sum teir føroyingar, sum eru skattskyldugir í Norra.

Serskipanir fyri arbeiðsmarknaðin o.a. eru settar í verk í Føroyum og øðrum londum fyri at ávirka selektivt og náa einum ávísum endamáli, sum politiski myndugleikin onkursvegna metir er gott fyri samfelagið, vinnuna o.a. Politiska skipanin í Føroyum hevur valt at beina burtur nakrar skipanir, sum eru við til at eggja føroyskum fiskimonnum at arbeiða og forvinna pening í øðrum londum - onnur lond gera tað øvuta. Serskipanir skulu her kompensera fyri, at fiskimenn eru

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

nógv burturúr heimanífrá og verða við til at líkastilla føroyskar fiskimenn við sínar útlendsku starvsfelagar, sum gjalda minni í skatt.

At spara upp til egnan aldurdóm umvegis individuellað pensjónstrygging ella individuellar samansparingaravtalur, verður vanliga stuðla av tí almenna, við lagligum skattareglum. Við avtøkuni av § 154 B, so ger føroyski politiski myndugleikin tað beint øvuta og revsar hesar fiskimenn skattliga.

Lægri kvotur í Barentshavinum og lægri fiskaprísir, og harvið lægri inntøkur, koma omaná hækkaða skattin hjá fiskimonnum við norskum skipum.

Tað tykist sum, at hesin skattapakkin varð skundaður í gjøgnum, uttan at politiska skipanin neyvt kendi avleiðingarnar. Tí eigur málið um § 154 B frádráttin at verða tikið uppaftur.

Tilmæli

Gjørd verður ein einføld og gjøgnumskygd skipan í skattalógini fyri føroyskar fiskimenn uttanlands, her Norra, og sum tekna trygging í NF og MPK. Hetta skal gerast fyri at sleppa undan tvískatting, kompensera fyri at vera nógv heimanífrá og fyri at líkastilla hesar borgarar skattliga og í aðrar mátar.

Mælt verður til aftur at seta í verk eina skipan við einum skatta- ella inntøkufrádrátti fyri pensjónsinngjøld til NF og MPK, ein kompensatión - antin sum linking í skattinum ella minking av skattskyldugi inntøkuni.

Eisini verður mælt til, at politiski myndugleikin tekur málið upp skjótast gjørligt, soleiðis at broytingin kann setast í gildið frá 1. januar 2024, afturvirkandi.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

INNGANGUR

Bakgrund

Løgtingið samtykti í desember 2023 at gera broytingar í skattalógini, soleiðis at § 154 B frádrátturin í skattinum av pensjónsinngjaldi frá føroyskum fiskimonnum uttanlands, til NF og MPK, varð avtikin ella strikaður - hetta við gildi frá 1. januar 2024. Frádrátturin í § 154 B varð eisini kallaður ein "linking í sjálvum skattinum".

Í Norra er tað stovnurin ella skrivstovan "Arbeids- og velferdsetaten" (NAV), sum umsitir skipanina Norsk Folketrygd og fólkapensjónina (inngjald 7,8%).

Maritim Pensionskasse er ein onnur skipan, sum umsitur eina pensjónsskipan fyri arbeiðstakarar, sum starvast umborð á norsk skrásettum skipum og ávísum flytførum eindum (inngjald 1,7%).

Síðan uppskotið varð lagt fram av landsstýrinum í november 2023, hevur felagið FFU, gjørd vart við støðuna og greitt frá, at hesar broytingar fóru at hava við sær, sera neiligar búskaparligar avleiðingar fyri fiskimenn arbeiðandi á norskum skipum, og at ógreiða kom at standast um, hvussu skattingin skulu fara fram eftir strikingina av § 154 B.

FFU er kunnað um av Taks, at í løtuni er ikki longur møguligt at linka skattin við inngjaldsupphæddini til NF og MPK (møguleikin er jú strikaður úr lógini) og útgjøld verða skattað sum vanlig inntøka. Hetta merkir, at fyrst verður lønarskatturin nógv hægri og síðan verður aftur skattur lagdur á framtíðar útgjøldini úr NF og MPK.

Tí hevur nevndin í FFU sett sær fyri at taka málið upp og gera eitt meira ítøkiligt fyrireikandi arbeiði at lýsa og útgreina støðuna, sum er íkomin, og royna at ávirka politiska myndugleikan til at broyta skattalógina, soleiðis at tað aftur verður heimilað at draga inngjøld til NF og MPK frá í skattinum ella inntøkuni.

Endamál og innihald

Endamálið við hesari frágreiðingini er, at skapa grundarlag fyri at finna eina skilagóða politiska loysn í málinum um avtøkuna av § 154 B frádráttinum og teimum sera óhepnu avleiðingum, sum standast av hesum.

Sostatt miðar FFU eftir at skapa innlit í og forstáilsi fyri teimum trupulleikum, sum hava rakt henda bólkin av fiskimonnum uttanlands, soleiðis at ein hóskandi loysn kann finnast.

Endamálið er eisini, at tilfarið skal brúkast til víðari arbeiðið at fáa málið loyst, við eitt nú at leggja tað fyri politiska myndugleikan, Fíggjarmálaráðið, Taks o.a. Tað er bara politiski myndugleikin, sum kann broyta íkomnu støðuna við, at galdandi skattalóggáva verður broytt.

Frágreiðingin inniheldur kunning, lýsingar og útgreiningar av skipanunum NF og MPK, virksemi hjá føroyingum í starvi uttanlands, búskaparligar útrokningar, herundir skattligar avleiðingar av at avtaka § 154 B frádráttin og um fiskiskap í Barentshavinum.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

FFU ynskir, at sett verður í verk aftur ein skipan, sum kompenserar fyri ógvusligu broytingunum í skattinum fyri fiskimenn uttanlands, og sum varð sett í gildi frá 1. januar 2024.

FFU heldur, at fiskimenn, sum rinda skatt í Føroyum, eiga at javnstillast við føroyskar skattgjaldarar og fáa linking í skattinum ella ein frádrátt í inntøkuni fyri inngjald til Norsk Folketrygd Maritim Pensionskasse - og eiga ikki at tvískattast.

Politiska gongdin í málinum

3. november 2023 legði landsstýrið fram alment eitt uppskot um at avtaka og tillaga hesar serskipanir (skattapakki um avtøku og niðurlaging av serskipanum), brot úr framløguni - eisini kallað ein skattaumlegging:

"**Serskipanir**

At hava serligar skattaskipanir til partar av arbeiðsmarknaðinum avlagar arbeiðsmarknaðin.

Fiskimannafrádráttur minkar

Fiskimannafrádrátturin minkar í tveimum.

Mesti frádrátturin, sum í dag er 14% av 470.000 kr., verður lækkaður niður í 400.000 kr. í 2024 og 300.000 kr. í 2025.

Uttanlandsfrádrátturin avtikin yvir 5 ár

Skatturin av uttanlandsinntøku er í dag 35%, men fyrst skulu 30% dragast frá upp til 120.000 kr. Hetta merkir, at skatturin av fyrstu 400.000 krónunum er 24,5% og síðani 35% av restini.

Uttanlandsfrádrátturin, sum er upp til 120.000 kr. verður avtikin yvir 5 ár. Hámarkið verður lækkað árliga við 24.000 kr., til frádrátturin er heilt burtur í 2028.

Samdøgurfrádrátturin avtikin yvir 5 ár

Samdøgurfrádrátturin, sum í dag er 300 kr. um dagin, verður lækkaður við 60 kr. hvørt ár soleiðis, at hann er heilt burtur í 2028.

Hugsanin við samdøgurfrádráttinum er at leggja upp fyri teimum serligu útreiðslunum, sum krevjast fyri at kunna arbeiða utanlands, so sum ferðing, gisting o.a. Í allar flestu førum er tað tó arbeiðsgevarin, sum rindar hesar útreiðslurnar, og tí virkar frádrátturin sum ein stuðul til arbeiði uttanlands.

§ 154 B frádrátturin avtikin

Sambært norðurlendsku konventónini um sosiala trygd, er persónur sosialt tryggjaður og skal rinda sosial gjøld í landinum, har viðkomandi arbeiðir. Til dømis skal persónur, sum býr í Føroyum og arbeiðir í Norra, gjalda til NF.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Sambært verandi skattalóg fáa tey, ið arbeiða uttanlands, frádrátt í skattinum fyri sosial gjøld uttanlands.

Tað er í andsøgn til endamálið við reglunum um tvískatting, at frítøka verður latin í skattinum fyri eitt gjald, sum viðkomandi er frítikin at gjalda í Føroyum.

Eftir, at staðfest er, at bæði heilsutrygdargjaldið og gjaldið til samhaldsfasta eru fevnd av norðurlendsku sosialkonventónini, er ikki longur grundarlag fyri hesum frádrátti. Tí verður hesin frádráttur strikaður."

Tað framgongur ikki beinleiðis av lógarfyrireikandi tilfarinum, hvussu nógv almennu kassarnir vinna meira í skattainntøkum við avtøkuni av júst § 154 B frádráttinum. Ein leyslig meting, sum FFU hevur gjørt, vísir, at almennu kassarnir vinna 10-12 mió. kr. árliga meira í skatti frá teimum 170 fiskimonnum, svarandi til inngjøldini til NF og MPK, sum verður trekt av lønini - upphæddin er treytað av inntøkustigi.

Hetta slagið av einum inntrivi fær skjótan virkna fyri almennu kassarnar og meirskatturin inkassaseraður beinanvegin. Sami skjóti virknaðurin slær í gjøgnum fyri teir 170 fiskimenn, sum verða raktir av hesum inntrivinum.

Í hesum sambandi varð lagt fram tilhoyrandi lógaruppskot um at fremja hesar broytingar hjá samgonguni og landsstýrinum. LM-037/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum).

Eftir politisku viðgerðina í Løgtinginum varð hetta broytingaruppskot samtykt og sett í gildið:

<u>Fiskimannafrádrátturin lækkar</u>

- ✓ 14% av veiðiinntøkuni upp til:
  a) Kr. 400.000 fyri 2024.
  b) Kr. 300.000 fyri 2025 og fylgjandi ár."

<u>Uttanlandsfrádrátturin lækkar</u>

- ✓ 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi:
  a) Fyri 2024: kr. 96.000.
  b) Fyri 2025: kr. 72.000.
  c) Fyri 2026 og árini fram: kr. 48.000."

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Samdøgurfrádrátturin lækkar

- ✓ Frádrátturin er í
  a) 2024: kr. 240.
  b) 2025: kr. 180.
  c) 2026 og frameftir: kr. 120.

§ 154 B frádrátturin avtikin

- ✓ § 154 B er strikað.

Hesar lógarbroytingar komu í gildið 1. januar 2024.

Samanumtikið, so royndi FFU at gera sína ávirkan galdandi undir politisku viðgerðini við upplýsingum og vitan. Nakrar av serskipanunum blivu ikki avtiknar, men heldur niðurlagaðar ella lækkaðar - kortini varð skipanin ella ásetingin um § 154 B frádrátt í skattinum (linking), strikað heilt.

Tá hugt verður eftir, hvussu skjótt hesin skattapakkin varð settur í verk og síðan tær sera óhepnu avleiðingar, sum standast av avtøku og niðurlaging av serskipanunum, so tykist tað sum málið politiskt varð skundað ígjøgnum, uttan neyvt at kenna avleiðingarnar.

Avleiðingin av at avtaka § 154 B frádráttin

Tá § 154 B frádrátturin nú er strikaður, er ein beinleiðis avleiðing, at bólkurin av fiskimonnum uttanlands, umleið 170 í tali, nú verða nógv harðari skattaðir og fáa, hvørki linking í sjálvum skattinum ella ein frádrátt í inntøkuni, sum allir føroyingar hava rætt til í sambandi við inngjald til eftirlønarsamansparing. Higartil eru inngjøldini drigin frá í sjálvum skattinum, men framyvir skal gjaldast til NF og MPK av skattaðum pengum.

Men harafturat verða útgjøldini frá NF og MPK framyvir skattaði sum vanlig skattskyldug inntøka í Føroyum. Hetta merkir, at meginparturin av útgjaldinum verður etin upp í skatti. Hesin hátturin fyri tvískatting stríðir ímóti meginregluni í skatting, at ein persónur ikki skal gjalda skatt tvær ferðir av somu upphædd ella gjalda skatt í tveimum londum.

Tað kann tykjast løgið at seta eina slíka serskipan úr gildið eftir fleiri árum. Vanliga, tá slíkar skipanir verða settar í verk og í eitt longri áramál, so skapar tað eina siðvenju og eitt fordømi, sum onkursvegna fær eina rættarliga binding.

Føroyskir fiskimenn uttanlands gjalda til NF og MPK, men detta við núverandi skattalóg niðurímillum, og fáa hvørki eina linking í skattinum ella ein frádrátt inntøkuni. Avleiðingin er, at teir knappliga fáa eina stóra skattahækking.

Meðan flest allir løntakarar arbeiðandi í Føroyum fingu ein skattalætta í 2024 og aftur í 2025 og fingu hægri løn (eisini hægri lønt fáa skattalætta og lønarhækkingar), so fingu føroyskir fiskimenn uttanlands ein skattasmekk og nærmast

revsaðir. Teir skuldu vera við til at fíggja skattalættan - ein ávísur lítil bólkur av samfelagsborgarum skuldi fíggja ein skattalætta til breiðu fjøldina av borgarum.

Tað, sum hevur størst ávirkan á teir, sum sigla við norskum fiskiskipi eftir lógarbroytingina, er inngjaldið til NF (7,8%) og MPK (1,7%) av bruttoinntøku, tí eftir lógarbroytingina skal gjaldast inn av skattaðum pengum.

Samanumtikið kann sigast, at við verandi broytingum, har § 154 B frádrátturin er strikaður, verða sjómenn nærmast tvingaðir at velja eina føroyska pensjónsskipan, sum stillar teir nógv verri fyri búskaparliga, og tá um ræður sosialar veitingar. Hetta fer sjálvandi ongin av teimum at gera.

Í ringasta føri kunnu hesar broytingar hava við sær, at fleiri sjómenn nú velja at flyta av landinum, serliga teir, sum eru stakir og ungir. Tað skulu møguliga ikki fleiri enn umleið 20% av fiskimonnunm flyta í annað land at búgva, so byrja almennu kassarnir at missa lønarskatt, netto og búskapurin annars missir pening úr renslinum til nýtslu (minkandi eftirspurningurin eftir vørum og tænastum) - eisini her missir landskassin inntøkur frá mvg- og øðrum gjøldum.

Vandi er eisini fyri, at fiskimenn flyta í aðrar vinnur og skipanir sum eitt nú NIS og DIS, og tá kemur als ongin lønarskattur í almennu kassarnar.

At spara upp til egnan aldurdóm umvegis individuellað pensjónstrygging ella individuellar samansparingaravtalur, verður vanliga í størri og minni mun stuðla av tí almenna, við lagligum skattareglum fyri tann, sum teknar slíkar tryggingar. Við avtøkuni av § 154 B, so ger føroyski politiski myndugleikin tað beint øvuta og revsar hesar fiskimenn skattliga.

Norsk Folketrygd og Maritim Pensionskasse - meginregla at tekna trygging

Føroyingar, búsitandi í Føroyum, men sum arbeiða uttanlands á norskum fiski-skipum eru allir fevndir av "folketrygden" og hava rætt til sosialar veitingar frá ”Arbeids- og velferdsetaten (NAV)” - hesi hava eisini ábyrgdina av dagpeningi við arbeiðsloysi. Í Norra er ein persónur automatiskt fevndur av arbeiðsloysis-trygging, tá ein arbeiðir og býr í Norra.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Sambært heimasíðuni hjá NAV:

"Ikke bosatt i Norge: Selv om du ikke bor i Norge, er du pliktig medlem i folketrygden, hvis du:

- arbeider i Norge eller på norsk kontinentalsokkel
- er norsk statsborger/ EØS-statsborger, og ansatt på norsk skip. Det er unntak, hvis du er cateringansatt på turistskip registrert i Norsk Internasjonalt Skipsregister, NIS
- er norsk statsborger/ EØS-statsborger, og ansatt i den norske statstjeneste i utlandet
- er norsk statsborger/ EØS-statsborger, og mottar støtte fra Lånekassen for å følge studier i utlandet. Det er unntak, hvis du studerer innenfor Norden, da skal du være medlem i trygdeordningen i det landet, der du er folkeregistrert.

Kelda:
https://www.nav.no/no/person/flere-tema/arbeid-og-opphold-i-utlandet/relatert-informasjon-/pliktig-medlemskap-i-folketrygden

Ein fiskimaður, sum arbeiðir á norskum fiskiskipi ella innan fyri norska kontinentalsokkulin og býr í Føroyum, hevur sostatt sum útgangspunkt skyldu at gerast limur í NF.

Viðmerkjast kann, at útisiglarar við norskum fiskiskipum ikki eru tvungnir at velja eina føroyska pensjónsskipan, t.d. eftirlønarsamsparing, gjald til AMEG o.a., men kunnu gera tað.

Norðurlendska konventónin um sosiala trygd sigur, at ein bara skal gjalda sosial gjøld, har viðkomandi arbeiðir.

Sambært upplýsingum frá Almannaverkinum:

"Tá ein fer í annað norðurland at arbeiða uttan at flyta bústað, er útgangsstøðið, at ein rindar avgjøld til sosialu skipaninar í tí landinum, har ein arbeiðir. Men sambært Nordisk Konvention om Social Sikring/EØS- forordning 883/04 ber til at søkja um at sleppa undan hesum gjøldum undir teirri treyt, at ein er sosialt tryggjaður í heimlandinum."

Viðmerkjast kann, at bara teir 170 fiskimenninir, sum eru fult skattskyldugir í Føroyum, kunnu velja. Onnur, sum búgva í Føroyum, starvast uttanlands og eru skattskyldug uttanlands, har viðkomandi arbeiðir, eru tvungin at rinda til skipanir, ið tí landinum ein arbeiðir.

Hetta merkir aftur, at skulu hesir fiskimenn onkursvegna óformelt tvingast í eina føroyska skipan við lógarásettari eftirlønarsamansparing og fáa ein frádrátt í inntøkuni, so kunnu teir velja tí norsku NF og MPK frá.

Í Norra er talan er um tvær pensjónir, sum føroyski fiskimenn eru fevndir av:

- NF (Folketrygden), 7,8%
- MPK (Maritim Pensionskasse), 1,7% - áður PTS (PensionsTrygd for Sjømenn)

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Tann seinna MPK er ein pensjónsskipan, ið er ætlað til, at ein kann velja at pensjónera seg sum 60-ára gamal. Hesa pensjónina fær ein so fram til ein er 67 ár, tá norska fólkapensjónin tekur yvir. Ein, sum ikki velur at pensjónera seg sum 60-ára gamal, fær hesa pensjónina útgoldnað frá tí, at hesin er 62 ár, óansæð um viðkomandi arbeiðir ella ikki.

Treytin fyri at fáa hesa pensjón, er at ein er limur í NF og rindar inn har eisini. T.v.s. at um ein nú velur ikki at gjalda inn til NF, so missir ein rættin til hesa pensjónina, og hvørgin pensjónin hækkar meira og ancienniteturin steðgar at vaksa, sum hevur við sær eitt lægri pensjónsútgjald.

Sjúkradagpeningurin er væl hægri frá NAV, samanborið við teir frá Almannaverkinum. Ein fær 70.000 NOK. umleið 45.500 Dkr. um mánaðin, og hetta útgjaldið verður skattað í Føroyum. So um ein fær umleið 20.000 kr. í sjúkrapengum um mánaðin frá Almannaverkinum í Føroyum og rindar 50% í skatt, so er almenna útreiðslan 10.000 kr. um mánaðin, men um ein sum er limur í NF og er sjúkrameldaður, so er inntøkan hjá almennu kassunum 22.750 kr., sum er skatturin av 45.500 kr.

T.v.s. spardar eru 10.000 kr. fyri tað almenna og ein skattainntøka uppá 22.750 kr., t.v.s. 32.750 kr. í pluss fyri almennu kassarnar fyri hvønn mánaða ein er sjúkrameldaður.

Samanumtikið eru veitingarnar frá NF og MPK munandi hægri enn tær føroysku veitingarnar, og tí gevur tað ikki meining at velja nakað verri. Men politiski myndugleikin vil við hesari broytingini í skattalógini trýsta privat-búskaparliga grundarlagið so nógv hjá hesum fiskimonnum, at teir nærmast verða tvingaðir at velja eina verri skipan til sosial gjøld.

Skattskyldugir føroyskir útisiglarar í Norra

Teir, sum sigla við norskt skrásettum skipum, sum virka á norska kontinentalsokklinum, og sum sigla við skipum í t.d. alivinnuni, frálandavinnuni, fólk, sum arbeiða á landi og onnur, sum hava skattskyldu í Norra, gjalda til NF og MPK. Gjøldini verða kravd inn saman við norska skattinum, men goldin verður bara skattur, tá pensjón og sjúkrapengar verða útgoldnir.

Harafturímóti skulu føroyskir fiskimenn í Norra - sum teir einastu, sum eru fult skattskyldugir í Føroyum - gjalda til NF og MPK av skattaðum pengum og so aftur gjalda skatt við útgjaldi av pensjón o.a.

Hetta er sera órættvíst og hongur ikki saman, tí tá kemur ein føroyskur fiskimaður at gjalda munandi meira inn til NF og MPK fyri at fáa somu pensjón, sum teir føroyingar, sum eru skattskyldugir í Norra.

Allar veitingar frá NF og MPK til føroyskar fiskmenn eru, sum áður nevnt, fult skattskyldugar í Føroyum.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Munurin á norskum og føroyskum fólkatryggingum o.a.

Tað er sera stórur munur á veitingunum frá norsku pensjóns- og øðrum fólkatryggingum og teimum føroysku pensjónsskipanunum. Eitt nú hevur NF eitt væl hægri pensjónsútgjald frá NAV og MPK eina nógv betri sjúkratrygging, hóast inngjøldini tilsamans eru helvtin av inngjøldunum í føroysku skipanirnar.

Í Føroyum hava vit t.d.:

- Fólkapensjón - kollektiv pensjónsskipan
- Eftirlønarsamansparing, eftirlønarlógin (bundnað eftirlønargjaldið 2014-2026, max 12%)
- Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, AMEG, 3%
- Privatar eftirlønarskipanir
- Privat uppsparing
- Pensjónsskipanir í útlandinum

Harafturat koma inngjøld til heilsutrygd, barsilsgrunnin o.a., umleið 3%. Hesi inngjøldini verða í Føroyum drigin av inntøkuni, eftir skatt, eins og nú verður gjørt við inngjøldini til NF og MPK (7,8%+1,7%) - talan er kortini um nógv lægri upphæddir og onnur sløg av gjøldum enn pensjónsgjøld.

Samlaða tvungnað inngjaldið í tær føroysku pensjónsskipanirnar er sostatt heili 18%, samanborið við Norra við 9,5% (7,8%+1,7%), og tá eru, sum áður nevnt, veitingarnar úr norsku skipanunum væl hægri og betri, og við t.d. útgjaldi av sjúkrapengum frá MPK, fellur skatturin til tað almenna, umframt onnur veiting frá NF til føroyskar fiskimenn, sum er skattskyldug í Føroyum.

Viðmerkjast kann, at pensjónin skal tryggja, at ein hevur pening til lívsins uppihald, sjálvt eftir, at ein er givin at arbeiða. Miðað verður eftir, at pensjónin skal verða so mikið høg, at ein ikki merkir munandi minking í livistøði ella at ein onkursvegna kann varðveita livistøðið, sum ein hevur havt gjøgnum arbeiðslívið.

Tað vil altíð vera ymiskt, treytað av arbeiðsinntøku, hvussu høga pensjón ein persónur megnar at fáa útgoldnað og kann dúva uppá restina av lívinum, umframt brúka av aðrari privatari uppsparing við síðurnar av tvungnu skipanunum.

Sosialar tryggingar, herundir pensjónsskipanir, sjúkratryggingar o.a., eru týðandi partur av einari vælferðarskipan, sum øll hava rætt og skyldu til at vera partur av. Føroyskir fiskimenn uttanlands og teirra familjur eru integreraður partur av føroyska vælferðarsamfelagnum og eiga tí eisini at fáa tær sømdir og ein lógartryggjaðan rætt at verða viðfarnir, sum allir aðrir borgarar, tá um ræður sosialar tryggingar - og ikki verða skattliga revsaðir.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Ósemja um slag av pensjónskipanum

Ein avgerandi fortreyt fyri at kunna veita frádrátt í inntøkuni er, at talan er um eina oyramerktað persónliga privata trygging - og ikki eina kollektiva fólkapensjón. Tað vísir seg her at vera ósemja um millum FFU og Taks um, hvat slag av pensjóns-skipan NF er, privat ella kollektiv - ein tulkingarspurningur, hóast innihald og fortreytir í ymsu skipanunum eru sera greiðar og kann prógvast.

NF er ein privat fólkatrygging, sum stendur í navninum á tí, sum rindar inn 7,8% til NF og 1,7% til MPK av inntøkuni. Viðmerkjast kann, at fyri at gerast limur í MPK skal ein hava teknað trygging í NF.

Ein persónur fær eina konto, sum peningurin verður settur á og kann fylgja við, hvussu nógv er inngoldið á kontoina hjá viðkomandi, t.e. avkast, umsitingargjald og hvat tú kanst vænta at fáa útgoldið í pensjón. Hetta merkir aftur, at útgjaldið varierar í takt við, hvussu stóra inntøku ein hevur gjøgnum arbeiðstíðarskeiðið o.a., tvs. ein, sum hevur høga inntøku fær eitt tilsvarandi høgt útgjald einaferð (eitt max er ásett fyri inn- og útgjøld).

Eftir hesum upplýsingum sæst, at talan er um eina individuella pensjón í NF, brot:

"Individuell pensjon

På toppen av dette har enkeltindivider anledning til å spare til egen alderdom gjennom individuell pensjonsforsikring eller individuelle spareavtaler som i større eller mindre grad er støttet av gunstige skatteregler."

Kelda: https://snl.no/alderspensjon

Eftir hesum upplýsingum sæst, at ein skal vera limur í NF, brot:

"Folketrygden finansieres ved medlemsavgift, arbeidsgiveravgift og tilskudd fra staten. Folketrygden administreres av NAV. Ytelser knyttet til helsetjenester er skilt ut og lagt til helseøkonomiforvaltningen (HELFO)."

"For rett til noen ytelser kreves det at medlemskapet skal ha vart en viss tid, som oftest tre år. Varigheten av medlemskapet er dessuten avgjørende for utmåling av uføretrygd og minsteytelsen i alderspensjonssystemet. Som hovedregel kreves det 40 års medlemstid mellom 17 og 67 år for å få fulle minsteytelser som alderspensjonist og full uføretrygd. For personer som tilstås uføretrygd godskrives medlemstid frem til 67-årsalder."

Kelda: folketrygden – Store norske leksikon (snl.no)

Hetta vísir greitt, at inngjøldini eru í navninum á tí, sum rindar inn (skrásetta liminum í skipanini hjá NAV, sum umsitur inn- og útgjøld), og ein fær oyramerkt tilsvarandi nakrar veitingar og tænastur, tá tryggingin fær virkna.

Ein kollektiv pensjón/ fólkapensjón er harafturímóti ikki privat ella persónlig, tí henda verður inngoldin í landskassan sum partur av samlaða skattinum hjá øllum skattaborgarum. Pensjónin verður síðan útgoldin úr aftur stórapotti ella felags-kassanum, sum skattafrí grundupphædd, viðbót (tengd at inntøku) o.a., tá ein

hevur nátt pensjónsaldri, og útgjaldið er ymiskt frá støkum til gift. Við hesari kollektivu pensjónsskipanini fáa øll líka uttan mun til lívsinntøku o.a.

Hetta talar fyri, at inngjald til NF, eins og inngjald til eina tvungnað privata eftirlønarsamansparing í Føroyum, eigur at kunna dragast frá í skattinum ella skattskyldugi inntøkuni og síðan skattast við útgjald (í Føroyum við inngjald), tvs. skattast einaferð.

Eftir hvat skilst, so velur Taks at tulka inngjøld til NAV sum partur av einari kollektivari pensjónsskipan og ikki sum eina privata fólkatrygging. Endamálið við hesari skeivu tulking, kann so bara verða at tryggja landinum meirinntøkur, men samstundis verristilla føroyskar fiskimenn uttanlands.

Norðurlendska tvískattaavtalan

Landsstýrið grundgevur í uppskotinum til at strika § 154 B frádráttin: "Sambært verandi skattalóg fáa tey, ið arbeiða uttanlands, frádrátt í skattinum fyri sosial gjøld uttanlands.

Tað er í andsøgn til endamálið við reglunum um tvískatting, at frítøka verður latin í skattinum fyri eitt gjald, sum viðkomandi er frítikin at gjalda í Føroyum."

Ein føroyskur fiskimaður, búsitandi í Føroyum og arbeiðandi í Norra, kann frítakast fyri at gjalda pensjónsuppsparing í Føroyum, og kann ístaðin velja at gjalda til NF og MPK. Við útgjald av norsku pensjónini fellur skatturin til tað almenna, men landið hevur tá ikki veitt nakran frádrátt í skattinum ella inntøkuni fyri, at fiskimaðurin kann sleppa undan einari sera harðari skatting, samanborið við ein vanligan skattaborgara í Føroyum - fyrst rinda til NAV og MPK av skattaðum pengum og síðan gjalda skatt av pensjónsútgjaldinum, tilsamans umleið 55-60%.

Meginreglan í skatting er, at ein ongantíð skal gjalda tvær ferðir skatt av somu inntøku. Her rindar fiskimaðurin til NF og MPK, sum verður kravt inn saman við skattinum, og síðan skatta Føroyar hetta inngjaldið sum part av skattskyldugi inntøkuni og síðan pensjónsútgjaldið sum vanlig skattskyldug inntøka - her er greitt talan um tvískatting.

Inngjøldini verða avroknað við, at reiðaríið trekkir tey av inntøkuni til NF og MPK.

Gjøld upp á 7,8% til NF og 1,7% til MPK, verður kravt inn saman við skattinum, men er oyramerkt til at dekka pensjón, sjúkrapengar, barsil o.a. - við øðrum orðum, tad fer ikki i stórapott, men í ein grunn, sum dekkar øll sosialgjøld. Øll útgjøld, sum føroyskir fiskimenn fáa úr grunninum eru fult skattskyldug inntøka í Føroyum.

Skipanin við § 154 B frádráttinum, við linking í skattinum, kom í skattalógina í 2012 og varð tá breitt og einmælt samtykt av øllum flokkum í Løgtinginum.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið frá landsstýrinum tá (lm. 34/2012), stendur m.a.: "Í dupultskattahøpi verður Folketrygden ikki roknað sum skattur, men eftir vanligum búskaparligum definitiónum er eingin ivi um, at Folketrygden er ein

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

skattur, og gjaldið til Folketrygden merkist tí í veruleikanum sum ein dupult-skatting.“.

Norðurlendska sosialkonventónin

Landsstýrið grundgevur í uppskotinum at strika § 154 B frádráttin: “Sambært norðurlendsku konventónini um sosiala trygd, er persónur sosialt tryggjaður og skal rinda sosial gjøld í landinum, har viðkomandi arbeiðir. Til dømis skal persónur, sum býr í Føroyum og arbeiðir í Norra, gjalda til NAV.”

Norðurlendska sosialkonventiónin varð broytt í 2008. Áður stóð, at pensjónir skulu bara skattast í gevaralandinum, also tí landinum, sum útbetalir - nú stendur “kann” skattast. Hetta merkir, at um Norra skattar pensjónina, so skulu Føroyar geva tilsvarandi linking í skattinum.

“Pensioner fra Færøerne bliver beskattet på Færøerne.

Pensioner fra et andet nordisk land kan beskattes i udbetalingslandet, således at Færøerne giver credit for skat betalt i dette land.”

Kelda: https://www.nordisketax.net/pages/da-DK/faroe-islands

Serskipanir uttanlands til sjófólk

Uttanlandsfrádrátturin og samdøgurfrádrátturin kompenserar ella vigar upp ímóti, at føroyskir fiskimenn eru nógv burtur frá familju, ferðaútreiðslur, hotel o.a.

Hesir fiskimenn og familjur teirra vilja, at víst verður teimum og teirra innsatsi eina ávísa virðing og forstáilsi, hetta fyri at arbeiða og virka fyri Føroya land – heimanífrá, frá familju og øllum virksemi, sum onnur taka fyri givið.

Frádráttirnar eru nú minkaðir niður í lítið og onki, og afturat hesum er allur frádrátturin í skattinum fyri inngjald til NF og MPK avtikin frá einum degi til annan.

Okkara útlendsku starvsfelagaðar eru harafturímóti so nógv virdir, at teir ístaðin fáa enn hægri frádráttir og gjalda væl lægri skatt.

Fiskimannafrádrátturin í Norra er ein fiski- og sjómannafrádráttur til fiskimenn og sjófólk, sum verður latin av inntøkuni. Ein fiskimaður, sum hevur fiskarí sum sítt høvuðsyrki í minst 130 dagar um árið, hevur krav uppá ein frádrátt uppá 30% av inntøkuni, frádrátturin hevur eitt evsta mark upp á t.d. 154.000 kr. árliga

Eitt nú í Ongland hevur ein lóg, sum kallast "Mariners Tax" – ein skipan, har veittur verður inntøkufrádráttur ella skattlætti um tú arbeiðir umborð á einum skipi.

Í Føroyum hevur politiski myndugleikin valt fíggjarliga at revsa borgarar, sum starvast á fiskiskipum uttanlands.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Avmarkingar

Striking av § 154 B er ein partur av einum samlaðum skattapakka frá samgonguni og landsstýrinum. Felagið metir, at tað í løtuni ikki eru útlit fyri at broyta ella venda aftur til upprunaligu skipanirnar við sjómannafrádrátti, uttanlandsfrádrátti og samdøgurfrádrátti.

Tí verður sett fokus á at gera nakað við teir stóru trupulleikar, sum nú standast av, at politiska skipanin hevur strikað § 154 B frádráttin í skattinum.

Tað verða ikki gjørdar greiningar av verandi lóggávu í Føroyum, Norra, altjóða tvískattasáttmálar, sosialkonventión o.a. á pensjónsøkinum, skattaøkinum og innan aðra viðkomandi lóggávu.

Tað verður ikki kannað, hvørt Løgtingið hevði heimild at strika § 154 B frádráttin.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

VIRKSEMI HJÁ FØROYINGUM Í STARVI UTTANLANDS

Hví serskipanir í Føroyum og øðrum londum?

Serskipanir fyri arbeiðsmarknaðin eru settar í verk í Føroyum og øðrum londum fyri at ávirka og náa einum ávísum ella selektivum endamáli, sum politiski myndugleikin onkursvegna metir er gott fyri samfelagið.

Hetta er galdandi á nógvum økjum í samfelagnum, har politiska skipanin selektivt velur út økir, sum hildið verður eiga at fáa onkran styrk ella kompenserast fyri eitt hvørt, sum ikki á sama hátt rakar onnur í samfelagnum. Vanligt er t.d. at geva frádráttir antin í inntøkuni ella sjálvum skattinum, áseta endurgjøld, koyri-peningur, ferðaendurgjald o.a.

Søguliga sæð, so vórðu hesar serskipanir fyri føroysjar fiskimenn settar í verk fyrst í 1990´unum í kreppuárunum. Endamálið tá varð at líkastilla føroyskar fiskimenn við sínar útlendsku starvsfelagar, sum rindaðu lægri skatt og harvið minka um vandan fyri enn størri fráflyting.

Politiska skipanin í Føroyum hevur nú eftir 12-30 árum valt at beina burtur nakrar serskipanir, sum eru við til at eggja føroyskum fiskimonnum at arbeiða og forvinna pening í øðrum londum - onnur lond gera tað øvuta.

Politiska og vinnuliga argumentið fyri at avtaka serskipanir er, at hesar skipanir avlaga arbeiðsmarknaðin og kappingina hjá føroyskum fyritøkum um arbeiðs-megina, t.v.s. tær mótvirka soleiðis, at føroyingar velja frá arbeiðir og størv, sum tørvur er á í Føroyum. Men hetta er ikki rætt og er ikki veruliga støðan. Ímynda vit okkum, at umleið 170 fiskimenn og nógv onnur fólk skulu trýstast inn á føroyska arbeiðsmarknaðin (her fiskivinnuna), so var heilt einfalt ikki pláss fyri teimum, tey høvdu meginparturin verði arbeiðsleys.

Eitt gott dømið er, at Búskaparráðið nýliga hevur mælt til at niðurleggja partar av heimaflotanum, vegna vantandi lønsemi. Talan gerst um eitt strukturelt arbeiðs-loysi, har tað ikki utan víðari ber til at fara í aðra vinnu í Føroyum, og fyri nøkur fólk kann tað gerast ein vanlukka.

Føroyskir arbeiðsgevarar megna heilt einfalt ikki at geva eina kappingarførað løn og starvsinnihald, í mun til nógv útlendsk arbeiðspláss - fleiri føroyingar, sum arbeiða í útlandinum manna nevnliga "high-skill jobs", sum ikki finnast í Føroyum, og sum krevja nógva útbúgving, skeiðir og sertifiseringar.


Valutainntøkur til Føroyar

Føroyskir fiskimenn og onnur, sum arbeiða uttanfyri Føroyar útvega føroyska samfelagnum stórar upphæddir í lønarinntøku, t..e nakað, sum fyllir upp í almennu kassarnar og sum annars fer í rensl í samfelagsbúskapinum - sjá mynd 1.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Mynd 1. Talið á føroyingum, sum pendla og teirra lønarinntøka í tíðarskeiðnum 2013-2022

Kelda: Frágreiðing frá Deloitte, Den samfundsøkonomiske betydning af internationalt pendlende færinger for det færøske samfund - December 2023



Kilde: TAKS og betalingsbalancestatistikken.

Mynd 1 vísir m.a., at føroyskir fiskimenn og onnur, sum arbeiða uttanfyri Føroyar, útvega umleið 1.000.000.000 kr. í lønarinntøku árliga, og henda upphæddin hevur ligið stabilt á hesum støði í fleiri ár. Ein millard svarar til heili 8,5% av samlaðu árligu lønarútgjaldingunum í Føroyum.

Talan er um eini 1.800 føroyingar, sum árliga pendla millum Føroyar og útlandið.

Til samanberingar, so rindaði øll alivinnan 572 mió. kr. í lønum í 2022, sambært Hagstovu Føroya - talan er sostatt ikki um eina lønartunga vinnu.

Føroyingar við norskum fiskiskipum og inntøka

Talið á føroyskum fiskimonnum uttanlands er umleið 170.

Hetta lutfalsliga stóra talið á føroyskum fiskimonnum uttanlands merkir, at bara hesin bólkurin forvinnur yvir 100.000.000 kr. í lønarinntøku til samfelagið Føroyar, hetta við t.d. einari miðal inntøku upp á 600.000 kr. árliga.

Síðan kemur talið á føroyskum fiskimonnum, sum gjalda skatt av sosialum gjøldum frá NF og MPK.

Vandin fyri fráflyting og flyting í aðrar skipanir, NIS og DIS

Tað er sera vánalig timing at styggja fólk vekk úr Føroyum við skattahækkingum, serliga nú fiskiskapurin í Barentshavinum eisini gerst munandi minni - hetta er als ikki løtan at hækka skattin og revsa teir umleið 500 føroyingarnar, sum fiska í Barentshavinum. Hetta er eisini vánalig timing, tá mælt verður til at niðurleggja partar av føroyska heimaflotanum.

Tað hava heili 1.226 fólk alment skrivað undir at mótmæla ætlanini hjá samgonguni og landsstýrinum at avtaka skattligu serskipanirnar fyri føroyskar fiskimenn og sjómenn við føroyskum og útlendskum skipum og arbeiðsfólk uttanlands. Hesar

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

undirskriftir (tá 1.162 í tali) vórðu handaðar landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum 1. desember 2023.

Føroyingar eru eftir hondini eitt mobilt fólkaslag og arbeiðsmarknaðurin er ógvuliga gjøgnumskygdur - tú fer har tú og familjan hava tað best at búleikast og virka og arbeiða. Hetta sóðu vit eisini undir kreppuni í 1990´unum.

Politiski myndugleikin er við hesum skattligu inntrivum við til upp á longri sikt at skunda undir eina fólkafráflyting av fólkum, sum útvega 1.000.000.000 kr. í lønarinntøkum til samfelagsbúskapin - taparin verða almennu kassarnir og vælferðarsamfelagið Føroyar. Hetta stendur eisini í stóran kontrast til, at landskassin og kommunurnar koma at fáa desperatan mangul uppá inntøkur, vegna sera vánaliga búskaparliga haldførið í samfelagnum. Samtundis eru ábendingar um, at arbeiðsloysið kvinkar spakuliga upp eftir - møguliga eitt tekin um broyttar tíðir fyri framman.

Tað er ikki bara vandi fyri, at fiskimenn uttanlands upp á stutt og millumlangt sikt flyta av landinum og taka skattin við sær til annað land, umframt taka við sær allan pening til nýtslu. Vandi er eisini fyri at nakrir flyta í annað starv og aðrar skipanir sum eitt nú NIS og DIS, og tá verður heldur ongin lønarskattur til landskassan og kommunukassarnar.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum


BÚSKAPARLIGAR ÚTROKNINGAR - HAGTØL OG GREININGAR

Gamla og nýggja skipanin - broytingin

Serskipanirnar fyri føroyskar fiskimen uttanlands hava verið galdandi líka síðan byrjanina av 1990´unum í skattalógini (§ 154 B síðan 2012), og hesar hava sostatt virkað í heili 30 ár fyri henda bólkin og onnur, sum arbeiða og virka uttanlands, her serliga í Norra. Knappliga skulu serskipanirnar avtakast, niðurlagast og tillagast.

Á mynd 2 er gjørd ein samanbering av gomlu og núverandi skipan, har § 154 B frádrátturin er strikaður í skattalógini.

Mynd 2. Samanbering av skatting o.a. millum gamla skipan og nýggja skipan
Kelda: Egin uppseting



Mynd 2 vísir m.a., at við nýggju skipanini, skal pensjónsinngjald til NF og MPK rindast av inntøkuni eftir skatt og við útgjald skal vanligur skattur rindast. Hetta merkir m.a., at ein stórur partur av pensjónsinngjaldinum fer upp í skatti, tá tað einaferð verður útgoldið, umleið 55-60%.

Ein leyslig meting vísir, at tað vil kostað almennu kassunum einar 10-12 mió. kr. árliga at seta skipanina við linking í skattinum í verk aftur fyri fiskimenn (umleið 170), meðan ein frádráttur í inntøkuni vil kostað væl minni. Hinvegin so er skipanin nýliga avtikin og fígging var til hana tá.

Skattaútrokningar - fíggjarligar avleiðingar

FFU hava gjørt nakrar útrokningar av skattligu støðuni hjá føroyskum fiskimonnum við norskum fiskiskipum eftir, at serskipanin við § 156 B frádrátti er avtikin, umframt at framdar eru tillagingar í øðrum serskipanum, sjá talva 1.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Endamálið við hesum útrokningunum er at lýsa tær ógvusligu búskaparligu avleiðingar, sum hesin samfelagsbólkur er raktur av, við munandi hægri skatti. Sjálvt um broytingarnar eru settar í verk stigvíst, so er talan longu nú í 2024 um sera umfatandi ávirkan ella nærmast fullan ávirkna, sum slær í gjøgnum.

Talva 1. Skattaútrokningar og avleiðingar við avtøku av serskipanum, FFU
Kelda: Egnar útrokningar og uppseting av talvu

Samanbering, áðrenn og eftir skattabroyting - tíðarskeiðið 2023-2026

Inntøka Dkr. (Skattur uttan NF og MPK)	**650.000**	**1.000.000**	**1.800.000**
Nettoskattur 2024, uttan broytingar	127.304	262.434	591.394
Mánaðarliga	*10.609*	*21.870*	*49.283*
Nettoskattur, við broytingum			
Nettoskattur 2024	198.999	368.469	773.429
Mánaðarliga	*16.583*	*30.706*	*64.452*
Nettoskattur 2025	210.860	381.630	786.590
Nettoskattur 2026	216.335	387.705	792.665
Meirskattur			
Meirskattur 2024	71.695	106.035	182.035
Mánaðarliga	*5.975*	*8.836*	*15.170*
Meirskattur 2025	83.556	119.196	195.196
Meirskattur 2026	89.031	125.271	201.271

Viðmerking
Skattaútrokningar í talvu 1 eru reinskaðar fyri gjøld til NF og MPK, sjá tí eisini talvu 2 niðanfyri.

Parametrar
Kommunuskattaprocent 20,02% og Kirkjuskattaprocent 0,60%
Folketrygd 7,80% og PMK 1,70%
Dagatal 200

Samdøgursfrádráttur 2023 300
Samdøgursfrádráttur 2024 240
Samdøgursfrádráttur 2025 180
Samdøgursfrádráttur 2026 120

Fiskimannafrádráttur 2023 % 14%
Fiskimannafrádráttur 2024 % 14%
Fiskimannafrádráttur 2025 % 14%

Fiskimannafrádráttur 2023 max 470.000
Fiskimannafrádráttur 2024 max 400.000
Fiskimannafrádráttur 2024 max 300.00

Í talvu 1 er útroknaður meirskatturin í tíðarskeiðnum 2024-2026, sum fylgja av broytingunum í § 33, nr. 12 og 17 og § 154 B í skattalógini.

Meirskatturin fyri tíðarskeiðið 2024-2026 er vístur samanborið við nettoskatt fyri 2024, uttan broytingar í omanfyristandandi ásetingum í skattalógini. Eisini er hædd tikin fyri skattalækkingunum í 2024 og 2025.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Talvan er bara viðkomandi fyri skatt av inntøkum fyri arbeiði umborð á norskum fiskiskipi. Talvan er grundað á, at rindað verður til NF 7,8% og PMK 1,7% av lønarinntøkuni.

Talva 1 vísir m.a., at við einari inntøku upp á 650.000 kr., so er meirskatturin 71.695 kr. í 2024, svarandi til 5.975 kr. mánaðarliga. Jú, hægri inntøka - jú, hægri meirskattur. Harafturat vísir talvan, at virkningurin av skattabroytingini slær longu í gjøgnum í 2024, nærmast við fullari megi. Serliga er tað avtøkan av § 154 B frádráttinum, sum beinanvegin ger allan munin í 2024, meðan hinar tillagingarnar í skattaumleggingini sláa víðari í gjøgnum í 2025 og 2026.

Støðan gerst ikki betri av, at toskakvoturnar í Barentshavinum eru lækkaðar munandi og lækka enn meira komandi árini, og harvið minka veiðiinntøkurnar eisini munandi. Samtundis eru fiskaprísirnir lækkaðir nógv, eitt nú á hýsu og upsa. Hetta verður nærri lýst seinni í hesari frágreiðingini í stykkinum "Fiskiskapur í Barentshavinum - útlit".

Í talvu 2 eru gjøldini til NF og MPK løgd afturat skattinum, sum er útroknaður í talvu 1. Á henda hátt fæst ein greiðari mynd av, hvørjar broytingarnar eru í sjálvum skattatrýstinum - samlaður skattur og gjøld í mun til inntøku tilsamans.

Talva 2. Skattatrýst, áðrenn og eftir skattabroytingar 2023-2024
Kelda: Egnar útrokningar og uppseting av talvu


Inntøka Dkr. (Skattur við NF og MPK)	**650.000**	**1.000.000**	**1.800.000**
Gomul skipan			
Skattur, við frádrátti	127.304	262.434	591.394
NF og MPK, 7,8% + 1,7%	61.750	95.000	171.000
Skattur, við NF og MPK	189.054	357.434	762.394
Skattatrýst	**29%**	**36%**	**42%**
Nýggj skipan			
Skattur, uttan frádrátt 2024	198.999	368.469	773.429
NF og MPK, 7,8% + 1,7%	61.750	95.000	171.000
Skattur, við NF og MPK 2024	260.749	463.469	944.429
Skattatrýst	**40%**	**46%**	**52%**
Munur 2023-2024	**11%**	**11%**	**10%**

Talva 2 vísir m.a., at skattatrýstið er økt við 10-11% frá 2023 til 2024 (og økist enn meira í 2026 við millum 11-14%) - og lægri inntøkurnar harðast skattaðar.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Mynd 3. Hækkingar í skattinum eftir avtøku av serskipanum, við NF og MPK
Kelda: Egnar útrokningar og uppseting av grafikki



Viðmerking

Samanbering millum støðuna áðrenn og eftir skattabroytingina í 2024 byggir einans á skiftið frá 2023 til 2024. Hetta av tí orsøk, at longu í 2024 slær skattabroytingin nærmast fult í gjøgnum - niðurstøðan um hørðu skattina verður tí nærmast óbroytt.

Mynd 3 vísir m.a., at tað eru serliga inntøkubólkurin av fiskimonnum við lægri inntøku, sum verður lutfalsliga harðast raktur við skattahækking (38%), næstan tvífalt so hart sum tann við nakað hægri inntøku (24%). Talan er her um hækkingar í sjálvum skattinum - og ikki skattatrýst.

Ávirkan frá lønarinntøkum á almennu kassarnar

Sambært frágreiðingini frá Deloitte, stendur fylgjandi: "Tilsammen bidrager de pendlende færinger med cirka 435 mio. kr. til de offentlige kasser. Heraf er de 105 mio. kr. fra afledte effekter, som med den lave arbejdsløshed på Færøerne må antages ikke ville bortfalde helt, selvom disse pendleres efterspørgsel ikke skabte denne aktivitet."

Kelda: Frágreiðing frá Deloitte, Den samfundsøkonomiske betydning af internationalt pendlende færinger for det færøske samfund - December 2023

Um vit hugsa okkum, at t.d. 35 út av 170 fiskimonnum (umleið 20%) velja at flyta til annað land at búleikast ella í aðra vinnuskipan NIS/ DIS, so vísir ein leyslig meting, at almennu kassarnir missa stóra upphædd í skattainntøkum, og meira enn sparingina við, at linkingin dettur burtur.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Netto fara almennu kassarnir at missa millióna upphædd á hvørjum ári, møguliga millum 1-1,5 mió. kr., treytað av inntøku og tali á teimum, sum flyta, og yvir fleiri ár verður talan um stórar upphæddir akkumulerað. Harafturat vil inntøkan eftir skatt detta burtur úr peningarenslinum, og harvið hvørvur nýtslan og MVG o.a., um teir flyta í annað land.

Jú hægri inntøkur eru knýttar til teir, sum flyta, jú hægri missur fyri almennu kassarnar.

Hesin bólkur av fiskimonnum uttanlands, sum er fult skattskyldugur í Føroyum, er í vanda fyri at minka nógv, kanska burtur í einki vegna væl størri skattatrýst, tvískatting av pensjónum, minking í kvotum og stórun valutatapi. Tí skuldi politiski myndugleikin heldur fingi betra um treytirnar, so at enn fleiri, sum eru í vinnum, har skatturin liggur eftir í arbeiðslandinum, heldur vilja søkja yvir í hesa vinnuna (fiskivinnuna), og sostatt gjalda skatt í Føroyum og ikki í útlandinum - og harvið økja um inntøkurnar til almennu kassarnar.

Føroyskir fiskimenn uttanlands eru nevnliga teir einastu, sum eru fult skatt-skyldugir í Føroyum í mun til aðrar útisiglarar o.o.

Vanligt við serskipanum - fiskimenn uttanlands minni virdir í Føroyum

Í Føroyum eru nógvar ymiskar serskipanir, eitt nú barnafrádráttur, afturat lønini verður goldið kostnaðarendurgjald fyri flutning, koyripeningar og tunnilsgjald. Landið útvegar og rindar fyri allar neyðugar samskiftisútreiðslur, t.e. keyp og nýtsla av fartelefonum og interneti hjá politikarum og starvsfólkum. Endurgjald veitt fyri útreiðslur til bústað í høvuðsstaðnum til landsstýrisfólk upp til 10.000 kr. pr. mánað fyri húsaleigu, el og hita.

Embætisferðir innanlands og uttanlands hjá landsstýrismonnum fara fram eftir somu reglum, sum galda fyri tænastumenn landsins - landið rindar dagpening, flutning, gisting o.a.

Aftrat løn og vanligari viðbót, fáa løgtingsfólk kostnaðarendurgjald fyri útreiðslur, sum standast av arbeiðnum sum løgtingsfólk. Flutningskostnaður við egnum bili við Strandfaraskipum Landsins, 100 ferðir aftur og fram árliga.

Harafturat koma tímapeningur og kostnaðaríkoyti uppá 2.000 kr. um mánaðin. Gjøldini eru øll skattafrí.

Í sambandi við ferðing uttanlands í løgtingsørindum verður veitt ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins.

Hesar serskipanir til politikarar og sendifólk eru gjørdar við fyrimynd eftir donskum ella norðurlendskum meginreglum og skipanum - nakað, sum politiskia skipanin vil javnseta seg við. Men, hví er tað ikki eisini galdandi fyri føroyskar fiskimenn og sjómenn við føroyskum og útlendskum skipum og arbeiðsfólki uttanlands - hesi vilja eisini javnsetast við teirra útlendsku starvsfelagaðar og onnur lond, sum seta í verk og styrkja serskipanir fyri sjófólk ella fiskimenn.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Tað er vert at leggja til merkis, at veitt verður kostnaðarendurgjald til flutning innanlands og uttanlands fyri flutning hjá teimum alment settu, meðan føroyskir fiskimenn uttanlands, skulu skerjast munandi í samdøgurfrádráttinum - og stendur tað upp til landsstýrið, skal hesin samdøgurfrádráttur eisini avtakast. Viðmerkjast kann, at tað ikki eru allir útlendskir arbeiðsgevarar, sum endurrinda fyri flutningsútreiðslur hjá fiskimonnum uttanlands, og um mann ivast, hvørt ein arbeiðsgevari endurrindar, so ber væl til at skjalprógva slíkar útreiðslur.

Í mvg-lógini verða gjørd fleiri undantøk fyri ávísar bólkar og virksemi, sum eru frítikin fyri mvg-skyldu - enn eitt dømi um, at tað almenna ger undantøk og serskipanir til ávís endamál.

Samanumtikið kann staðfestast ein røð av serskipanum í samfelagnum. Hetta má vera tí, at politiska skipanin heldur tað vera gagnligt og rætt, selektivt at stuðla ávísum samfelagsbólkum, umvegis ymiska serlóggávu, reglur og fyriskipanir.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

FISKISKAPUR Í BARENTSHAVINUM - ÚTLIT

Toskafiskiskapurin í Barentshavinum í kreppu - føroyingar raktir

Framtíðar fiskiskapur í Barentshavinum

Norskir granskarar frá Havgranskingarstovninum HI óttast eina veruliga kreppu fyri framman viðvíkjandi toskafiskiskapinum í Barentshavinum, hetta hóast Norra og Russland í 2002 gjørdist samd um, at kvoturnar á toski skuldu kunna lækkast upp til 20% frá ár til ár. Tað hevur víst seg síðan, at toskastovnurin er so illa fyri, at nøkur halda, at lækkingarnar í kvotunum áttu at veri enn hægri.

Tosað verður um eina møguliga minking av toskakvotuni frá 2022 til 2025 uppá millum 50-70%. Hetta er ein sera stór lækking og kemur at raka bæði føroyska og norska fiskiflotan, sum fiskar har sera hart - og ikki minst teir umleið 500 føroysku fiskimenninar, við væl lægri inntøkum/ hýrum.

Føroysku reiðarí´ini hava júst gjørt íløgur fyri 1,3 mia. kr. í nýggj fiskiskip og hvørs veiðigrundarlag eisini er toskafiskiskapurin í Barentshavinum.

Vit tosa her um eina niðurgongd (U-gongd), sum kann vara í 5-7 ár, sambært fiski-frøðini.

Eftir hesum koma almennu kassarnir at fáa munandi minni í tilfeingisgjaldi komandi árini. Spurningurin er um politiska skipanin er greið yvir hesi vánaligu útlitini.

Fiskaprísir og inntøkur fara at lækka

Tað eru ikki bara toskakvotan, sum minkar munandi - tað ger eisini prísirnir á hýsu og upsa.

Í t.d. 2023 lækkaði hýsuprísurin við 35% og upsaprísurin við 28%.

Hesar príslækkingar raka inntøkur/ hýrur bæði í føroyska og norska fiskiflotanum - og tað sama teir umleið 500 føroysku fiskimenninar.

Samstundis er norska krónan lækkað við 15%, bara i 2023.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Veiðihagtøl - nøgdir og virði

Umframt at verða raktir av hægri skatti í Føroyum, so eru útlitini hjá føroyskum fiskimonnum sera óviss, tá um ræður veiði í Barentshavinum og hýrir.

Talva 3. Inntøkubroytingar og skattaútrokningar - fiskimaður við norskum trolara 2022-2025
Kelda: Egnar útrokningar og uppseting av talvu


	2022		
	Brutto		**Netto**
Veiðivirðið	**180.000.000**		**144.000.000**
Inntøka hjá dekkara		NOK	1.022.400
		DKK	725.904
Eftir skatt		DKK	**450.000**
	2023		
Toska- og hýsukvota er lækkað og norska krónan er lækkað 13 %			
	Brutto		**Netto**
Veiðivirði	**160.000.000**		**128.000.000**
Inntøka hjá dekkara		NOK	908.800
		DKK	572.544
Eftir skat		DKK	**345.000**
Meting	**2024**		
Toska og hýsukvota er lækkað 20 %			
	Brutto		**Netto**
Veiðivirði	**140.000.000**		**112.000.000**
Inntøka hjá dekkara		NOK	795.200
Minking í nettoløn, 36% síðan 2022		DKK	500.976
Eftir skatt			**313.000**
Meting	**2025**		
Toska og hysukvotan lækkar 20 %		Og avtøka av frádráttum	
	Brutto		**Netto**
Veiðivirði	**125.000.000**		**100.000.000**
Inntøka hjá dekkara		NOK	710.000
Minking i nettoløn, 40% síðan 2022		DKK	454.400
Eftir skatt			**280.000**

Talva 3 vísir m.a., at inntøkan eftir skatt fellur við 105.000 kr. í 2023 (23%) - 32.000 kr. í 2024 (9%) - og aftur í 2025 eitt fall upp á 33.000 kr. (11%). Tilsamans eitt fall í inntøkunum eftir skatt uppá 170.00 kr. í hesum tíðarskeiðnum, svarandi til 38%.

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

Mynd 4. Inntøkulækking frá lægri veiði við norskum trolara
Kelda: Egnar útrokningar og uppseting av grafikki



Mynd 4 vísir m.a., at stórt fall er í inntøkunum longu í 2023 og metingarnar fyri 2024 og 2025 vísa framhaldandi fall í inntøkunum. Hetta inntøkufall kemur samstundis sum føroyski politiski myndugleikin leggur stóran meirskatt ella harðari skatting á henda sama bólk av fiskimonnum.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

HVAT TALAR FYRI EINUM FRÁDRÁTTI - KOMPENSATIÓN

Tær lýsingar og greiningar, sum gjørdar eru í hesari frágreiðingini vísa greitt, at tað eru fleiri týðandi viðurskifti, sum tala fyri, at føroyskir fiskimenn uttanlands fáa nakrar skattligar sømdir, sum javnstillar teir við aðrar skattaborgarar í Føroyum og teirra starvsfelagar í útlandinum.

Í talvu 4 er gjørdur ein samandráttur av teimum mest týðandi viðurskiftunum, sum tala fyri og ímóti at geva ein frádrátt í skattinum ella inntøkuni fyri inngjøld til NF og MPK.

Hvat talar fyri og ímóti einum frádrátti, kann síggjast frá sjónarmiðnum ella áhugamálunum hjá fiskimonnunum uttanlands og áhugamálunum hjá landinum.

Talva 4. Hvat talar fyri og ímóti frádrátti fyri inngjøld til Norsk Folketrygd og Maritim Pensionskasse
Kelda: Egin uppseting

Talar fyri frádrátti	Talar ímóti frádrátti
• Serskipan virka í 12 ár • Sera hørð meirskatting, Norsk Folketrygd og Maritim Pensionskasse, bæði við inn- og útgjald • Norsk Folketrygd og Maritim Pensionskasse góðkendar pensjónsskipanir av føroyskum myndugleikum • Norsk Folketrygd og Maritim Pensionkasse eru privatar pensjónsskipanir, ikki kollektiv fólkapensjón • Føroyskir fiskimenn flyta av landinum (almennu kassarnir missa inntøkur, netto) • Føroyskir fiskimenn fara á aðrar vinnuskipanir NIS og DIS (almennu kassarnir missa inntøkur, netto) • Aðrir føroyskir útisiglarar enn fiskimenn rinda bara skatt av pensjón við útgjald	• Almennu kassarnir vinna nakrar meirinntøkur í skattinum upp á stutt sikt (men flyta fiskimenn uttanlands í annað land ella aðra skipan at virka NIS ella DIS, so fara alemnnu kassarnir at missa inntøkur, netto) • Serskipanir avlaga arbeiðsmarknaðin (serskipanirnar eru nú niðurlagaðar og linking í skattinum, sum er strikað við § 154 B, hevur onki við eina serskipan at gera, men er ein spurningur um at javnstilla føroyskar skattaborgarar o.a.)

Talva 4 vísir m.a., at tað er bæði fleiri og meira týðandi viðurskifti, sum tala fyri at veita ein frádrátt í inntøkuni fyri fiskimenn uttanlands, enn tað, sum talar í móti.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

ARBEIÐS- OG TÍÐARÆTLAN

FFU hevur sett sær sum mál, at hetta málið sum skjótast verður lagt fyri politiska myndugleikan at viðgera og taka støðu til av nýggjum.

Jú, longur hetta málið dregur út, jú meira er tað eitt tekin um, at felagið góðtekur lógarbroytingina um at strika § 154 B frádráttin, ella vísir ein passivitet, sum onkursvegna er við til at staðfesta ella góðtaka avgerðina hjá politiska myndugleikanum.

FFU sær fyri sær hesa arbeiðs- og tíðarætlan:

- Kunning um innihaldið í frágreiðingini, framløga og tíðindaskriv
- Samskifti og samstarv við landsfyrisitingina og politiska myndugleikan
- Uppfylging